FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 14. november 2025

Hoyringarskriv til broytingar í veiðigjaldslógini

Fíggjarmálaráðið hevur sent lógaruppskot um broytingar í veiðigjaldslógini til hoyring. Uppskotið snýr seg um at strika sonevnda helvtargjaldið í grein 7 í lógini.

Viðmerkjast skal fyrst, at uppskotið er sent pørtunum til hoyring við rímiligum skotbrái, soleiðis at hampulig tíð er til at meta um grundgevingar og møguligar avleiðingar. Vónin er, at hetta kann geva grundarlag undir einari gjøllari viðgerð, og Føroya Reiðarafelag skal hervið gera hesar viðmerkingar.

Uppsjóvarvinnan stendur yvirfyri stórum avbjóðingum í 2026, og tí kann hetta uppskotið hava óhepnar avleiðingar fyri flotan. Orsøkin til hetta er, at kvotan av svartkjafti lækkar 41%, umframt at ICES mælir til eina lækking av makrelkvotuni uppá 70%. Ógreitt er, hvussu stór makrelkvotan verður í 2026, men tó er vist, at talan verður um ein munandi niðurskurð í kvotuni.

Føroya Reiðarfelagið undrast á, at tá ið stórar avbjóðingar standa fyri framman, svarar landsstýrið við einum uppskoti, sum skal gera tað uppaftur truplari hjá vinnuni. Uppskotið velur ta mest víðgongdu loysnina, tá truplar tíðir standa fyri framman.

Kvotan av norðhavssild hækkar 33%, men talan er um eina kvotu, sum frammanundan er sera lág, og tí er hækkingin í føroysku kvotuni bert 13.000 tons áðrenn býti við onnur lond. Harumframt hava Føroyar lækka sín lut í semju við Noreg, og tí er kvotan væl lægri enn undanfarin ár. 2026 verður tí helst munandi lakari enn 2025 fyri uppsjóvarflotan.

Víst verður eisini á, at sjálvur veiðigjaldsstigin í skjali 1b í lógini hækkar við tveimum prosentstigum tann 1. januar 2026, og tí kemur ein hækking í gildi um ársskiftið. Hetta er gjørt fyri at landið kann fáa hægri inntøkur, tá ið uppboðssølukvotur við hægri gjaldi renna út í 2025 og 2026. Tískil fáa øll uppsjóvarfiskasløg eitt hægri veiðigjald tann í næstum.

Felagið hevur áður víst á, at helvtargjaldið í grein 7 er ein fyribils fallskíggi hjá skipunum, tá ið kvoturnar brádliga lækka. Helvtargjaldið er bert galdandi fyri eitt ár í senn, og tað er lítið sannlíkt, at helvtargjald er galdandi í meira enn eitt ár. Tískil er talan um ein sera lítlan váða, sum landið eisini eigur at taka lut í.

Um makrelkvotan lækkar 70%, verður mælt til, at makrelur varðveitir helvtargjald í 2026. Um kvotan tó verður hægri t.d. 300.000 tons, verður mælt til, at helvtargjaldið fyri makrel ikki verður galdandi fyrra hálvár í 2026, soleiðis at gjaldið verður óbroytt eftir ársskiftið. Hinvegin eigur ásetingin at koma í gildi eftir 1. august 2026 fyri makrel.

Um hugt verður eftir møguligum kvotum av makreli hjá føroyskum skipum fyri 2026 er greitt, at skipini fara at hava sera smáar kvotur í 2026. Hetta merkir í praksis, at veiðigjaldið fyri makrel verður verandi á 4,5 kr/kg fyri tann fiskin, ið verður veiddur í januar í bretskum sjógvi. Tó eigur ásetingin at vera standandi í lógini við hesum undantaki.

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

Tað hevur víst seg, at sera trupult er at meta um fiskaprísir fram í tíðina, og avreiðingarprísurin fyri makrel hevur verið hægri, enn mett varð í 2024, tá avtala varð gjørd um makrel. Hetta er síðani komið skipum og manningum til góðar, men tað er eingin vissa fyri, at prísurin í øllum førum vigar upp fyri lægri kvotum. Hetta er bert ein leyslig meting hjá Fíggjarmálaráðnum, sum ikki leggur nakrar útrokningar fram. Tí eigur hendan verjan ikki at verða avtikin uttan at seta eina aðra ístaðin.

Hinvegin er norðhavssildakvotan framvegis lutfalsliga lág samanborin við undanfarin ár, men ógreitt er, um kvotan verður so mikið lág, at grein 7 verður virkin komandi ár. Mælt verður til, at helvtargjaldið framvegis skal vera galdandi fyri norðhavssild fyri 2026, og grein 7 eigur at vera standandi við undantaki av makreli fyrra hálvár 2026. Hetta hevði verið ein meira hóvlig handfaring av hesi støðu.

Fíggjarmálaráðið hevur skyldu til at meta um avleiðingar av lógaruppskotum á fult upplýstum grundarlagi. Enn kenna vit ikki tær endaligu kvoturnar fyri 2026, tí at samráðingar um makrel verða hildnar í hesum døgum. Harumframt eru ongar sínámillum samráðingar lidnar enn, og tí er trupult at meta um, hvørt grein 7 verður virkin komandi ár.

Eitt dømi um tann stóra váðan í fiskiskapi er sjónligt í hesum døgum, har tey flestu føroysku uppsjóvarskipini hava roynt eftir norðhavssild í íslendskum, altjóða og norskum sjógvi, men einki hevur verið at fáa. Tí liggur framvegis ein ófiskað kvota uppá uml. 5.000 tons fyri 2025. Vónin er sjálvsagt, at hetta verður fiskað í tíðini, sum er eftir av árinum, men stór óvissa valdar í løtuni um tað.

Líkt er til, at føroysk skip fara at royna at fiska norðhavssild í norskum sjógvi í januar 2026, og føroysk skip sleppa ikki í norskan sjógv eftir 1. februar. Hetta er ikki roynt í mong ár, og tí er ivasamt, hvussu hesin fiskiskapur fer at hilnast. Tí er neyðugt at varðveita helvtargjaldið fyri sild í fyrra hálvári í 2026, um kvotan verður lægri enn markið, ið er treyt fyri helvtargjaldinum.

Fyri sild er í løtuni helvtargjald fyri 2025. Um grein 7 verður strikað ella kvotan hækkar upp um markið fyri helvtargjald, merkir tað, at veiðigjaldið 1. januar hækkar úr úr 0,75 kr./kg. til 1,50 kr. kg. Um hugt verður ítøkiliga eftir kvotunum fyri 2026, er lítið sannlíkt, at grein 7 verður virkin fyri norðhavssild og svartkjaft. Tó er ógvuliga sannlíkt, at tøka føroyska makrelkvotan verður lægri enn 50% samanborið við seinastu fimm árini. Avleiðingarnar fyri landskassan verða tí sera lítil, um grein 7 verður verandi.

Viðmerkingarnar siga eisini, at uppskotið í fjør varð broytt, soleiðis at ásetingin bert varð strikað fyri makrel í 2025. Orsøkin var stutta skotbráið fyri hoyringina. Tó er vert at vísa á, at orsøkin eisini var, at grundgevingarnar fyri norðhavssild ikki vóru eftirfarandi, tí at prísurin fyri norðhavssild ikki verður ávirkaður av avtalu við t.d. Noreg um atgongd til norskan sjógv.


Sagt verður í viðmerkingunum, at uppsjóvarskip fiska fleiri fiskasløg, og tí kann vera óneyðugt at taka serlig atlit til broytingar í einum fiskaslagi. Um hugt verður at støðuni komandi ár, er sannlíkt, at samlaða avreiðingarvirðið hjá uppsjóvarskipum fer at lækka munandi vegna lækkandi kvotur. Tí er støðan í 2026 júst tann, at fleiri fiskasløg standa fyri stórum skerjingum, meðan sildakvotan nærum stendur í stað.

Viðmerkingar ísv. avleiðingar siga, at verður grein 7 virkin, merkir tað, at veiðigjaldið fyri 2026 minkar 50%. Við støði í tilmælinum frá ICES, verður mett, at makrelur verður fevndur av helvtargjaldinum í 2026. Um makrelkvotan lækkar 70%, sum ICES mælir til, eigur helvtargjaldið at vera galdandi fyri makrel. Um Kvotan verður nakað hægri, kann makrelur hava sama veiðigjald sum nú í fyrra hálvári 2026.

Viðvíkjandi orsøkum til uppskotið verður skrivað, at tað verður *"mett óheppið, at avtalur, sum Føroyar ger við onnur lond um býti av fiski, skal hava so stóra ávirkan á veiðigjaldið."* Vísast skal enn einaferð á, at helvtargjaldið bert er galdandi fyribils í eitt ár. Eisini er sera lítið sannlíkt, at hetta kemur fyri fleiri ár á rað. Hinvegin eigur landsstýrið síðani at finna eina aðra loysn, soleiðis at land og floti deila váðan, tá ið kvotur eru fyri ógvusligum og brádligum lækkingum.

Viðmerkingarnar siga, at *"Verandi áseting um helvtargjald ger, at veiðigjaldið broytist ógvusliga rundanum árskiftið, um kvotan er minni enn eitt ávíst. Hetta kann viðvirka til, at kvota verður flutt tvørturum ár fyri at spara veiðigjald."* Víst verður á, at galdandi lóggáva um sjófeingi hevur ásetingar í §34, stk. 4 viðvíkjandi flyting av kvotu millum ár. Her er ásett, at upp til 10% av egnari árskvotu hjá tí ávísa fiskifarinum kunnu flytast til árið eftir. Harumframt er vanliga ásett í strandarlandaavtalum, at londini kunnu flyta 10% av ófiskaðari kvotu til árið eftir. Hetta merkir, at galdandi reglur longu hava forðingar fyri, at meira enn 10% kunnu flytast til árið eftir. Tí er hetta ikki eitt viðkomandi atlit, tá ið flyting av kvotu longu er avmarkað og stýrt í galdandi lóg.

Um hugt verður at fíggjarligu gongdini hjá føroyskum reiðaríum í uppsjóvarflotanum sæst, at miðal EBITDA hevur verið góðar 30 mió. kr. pr. skip í tíðarskeiðnum 2017-22. Úrslitið fyri 2023 var frægari enn vant vegna eina stóra ófiskaða makrelkvotu, ið varð flutt frá 2022 til 2023. Miðal úrslitið pr. skip líkist úrslitunum síðan 2017. Leggjast skal afturat, at søla av skipum ikki er við í hesi metingini.



Havast skal í huga, at veiðigjaldsstigin er soleiðis skipaður, at tá ið avreiðingarprísurin er hækkandi, kemur hetta reiðaríum til góðar, soleiðis at úrslitini eru betri, enn veiðigjaldsstigin leggur upp til, tí at gjaldið er seinkað við einum ári. Tí kunnu úrslitini tykjast betri, enn tey eru yvir eitt longri tíðarskeið.

Ofta hevur verið ført fram, at ætlanin er at skatta tann sonevnda yvir-normala vinningin í fiskivinnuni. Tó er eingin meting av, hvussu hendan broytingin fer at ávirka samlaðu skattingina hjá flotanum, og hvussu hetta tekur hædd fyri ymiskleikanum í flotanum, tá ið kvoturnar eru serliga lágar. Víst verður á, at fleiri skip í uppsjóvarflotanum fara at hava serstakliga lágar kvotur komandi ár, og tað er ein stórur meinbogi, um gjøldini í slíkum føri eru ov høg.

Føroya Reiðarafelag hevur gjørt nakrar fyribils og leysligar metingar av avreiðingarvirði og veiðigjøldum fyri 2026, og tær vísa, at netto avreiðingarvirðið hjá flotanum fer at lækka munandi komandi ár. Um makrelkvotan lækkar við 70%, fer samlaða netto-avreiðingarvirðið (eftir at veiðigjøld eru drigin frá) hjá uppsjóvarflotanum at lækka við einum helmingi, meðan netto-avreiðingarvirðið fer at lækka við uml. 40%, um makrelkvotan lækkar við 48%, sum eisini er ein møguleiki í ráðgevingini frá ICES.

Mett netto avr. virði (mió. kr.)	2025	2026 (makrel -70%)	2026 (makrelur -48%)
Avr. virðið tils.	2.332	1.258	1.533
Mett veiðigjøld	418	269	345
Netto avr. virði	1.914	989	1.188

Hendan uppgerðin skulu takast við fyrivarni, tí at talan er um fyribils metingar av kvotum, avreiðingarprísum og gjøldum fyri 2026. Tó er sannlíkt, at talan verður um ein munandi niðurskurð í 2026 í avreiðingarvirði.

Føroya Reiðarafelag vísir enn einaferð á, at landskassin eisini eigur at bera teir váðar, sum eru í fiskivinnuni, tá havt verður í huga, at gjøldini eru lutfalsliga høg. Tó er eisini greitt, at landsins fíggjarlóg møguliga er so hart sperd, at tað fær avleiðingar fyri viðgerð og avgerðir viðvíkjandi veiðigjøldum. Hetta er órógvandi, tí at beinleiðis inntøkur landsins frá veiðigjøldum og serskatti eru uml. fimmfaldaðar seinastu tíggju árini úr góðum 100 mió. kr. upp í góðar 500 mió. kr. Tó tykist haldførið landsins ikki at verða betrað nevnivert í hesum tíðarskeiði.

Fleiri uppsjóvarskip eru komin í flotan seinastu árini, og flotin er vorðin munandi størri. Hetta hevur verið politikkurin hjá tveimum fylgjandi samgongum í tíðarskeiðnum 2015-22. Hetta merkir eisini, at uppsjóvarkvotur eru meira smábýttar enn áður. Tískil fara summi skip at hava ómetaliga lítlar kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2026, og summi skip fara væntandi at verða trýst fíggjarliga vegna lágar kvotur og høg veiðigjøld. Einki sæst til, at hesi seinastu trý uppskotini um broytingar í veiðigjaldslógini hava tikið hædd fyri hesum, ella hava mett um avleiðingar fyri reiðaríini. Hetta átti at verið gjørt, tá ið broytingar verða gjørdar í veiðigjaldslógini.

Føroya Reiðarafelag

Stefan í Skorini, stjóri